Røða, Kristian Martin Petersen helt á fólkafundi á Varmakeldu í Fuglafirði 4. juli 2004

# Á Varmakeldu

Góðu fundarfólk - av bygd og í bý!

Varmakeldustevnan hevur aftur í ár tilboð av øllum handa slagi. Fólk samlast og kenningar hittast. Gestablídni er í hvørjum húsi og prátið gongur. Stak hugnaligt at vera ein partur av hesi atmosferu millum fjøllini. Vit hittast at hugna okkum. Vit hava stundir at hugna okkum í 3-4 dagar - men hvussu brúka vit hinar dagarnar í árinum - tá ið alt ov mong ikki hava stundir!

Hvørjum stunda vit eftir?

Renna vit eftir materialismuni - hvar er tá nøgdsemið?

Renna vit eftir tíðini - hvar er tá tolsemið?

Renna vit undan tíðini - hvørjum eru vit tá bangin fyri?

Moldbúgvarnir runnu av fjalli til fjall eftir mánanum - teir fingu onki burturúr!

Mær tykir, at vit renna ov nógv og liva ov lítið!

Mær tykir, at alt ov fá okkara hava stundir at vera til og at liva, meðan vit liva! Piet Hein sigur sigur:

*Husk at elske,*
*Mens du tør det.*
*Husk at leve,*
*Mens du gør det.*

Ongin okkara kann tveita burturav sær ella umbera seg og siga, at tað er hendan nútíðin, sum ger, at vit ikki hava stundir. Nútíðin hevur altíð verið - hon er bara ikki altíð í senn. Langt fyri okkara tíð - og langt fyri okkara tíðarrokning vistu nøkur, at lívið er eittans. Bert vit sjálvi hava møguleika at geva okkum stundir at liva - hóast vit hava nógv at gera. Tí at hava nógv at gera er ikki tað sama sum at hava ringa tíð!

Danski gudfrøðingurin og heimsspekingurin Kierkegaard sigur um ár 1840, at tey flestu menniskju hava so ringa tíð og stunda so nógv eftir njótingini, at tey drøna fram um hana. Tað gongst teimum, sum við hinum dvørginum, tá ið hann á slotti sínum helt vakt yvir tí burturfluttu prinsessuni. Bert tann eina dagin unti hann sær ein døgverðaslang. Tá ið hann vaknaði aftur var prinsessan flýdd. Beinanvegin lat hann seg í sínar sjeymilaskógvar og helt avstað; men longu eftir fyrsta feti sínum hevði hann runnið langt fram um prinsessuna.

Soleiðis renna mong okkara eftir njóting og fullkomuleika - í sjeymilaskóm. Men í tráanini eftir eydnu eru vit farin langt, langt yvir um ánna eftir vatnið - og tó liggur njótingin og lívsgleðin her fyri fótum okkara. Men alt ov nógv eru í sjeymíla skóm.

Eg sigi bara, stóðga á og tak lívið at tær! Nýt veðrið - um tað er stilli ella vindur, regn ella sól. Nýt ljósið eina summarnátt. Nýt myrkrið ein vetrardag. Hevur tú nakrantíð verið á fjøllunum ella havinum eina ljósa nátt - hví hevur tú ikki? Hevur tú nakrantíð givið tær stundir at lurta eftir kvirruni - ella at lurta eftir veðrinum, børnunum, tínum nærmastu, tínum næsta! Nýt lívið og nýt at vera til. Hvørjum hasta vit eftir, um vit ikki hava stundir?

Kierkegaard sigur eisini, at honum tykist tað mest láturliga av øllum vera at hava ringa tíð. At skunda sær eftir øllum. Hesi menniskju, sum ikki hava stundir at ganga men nærum renna, duga ikki at liva, sigur Kierkegaard.

Nú skal eg skunda mær at leggja afturat, at sambært Kierkegaard duga tit í øllum førum væl at liva eina løtu í dag, tí tit hava givið tykkum stundir til ein fólkafund!

Kierkegaard heldur, at tann mest komiska sjónin er at síggja ein skundmiklan handilsmann fúka avstað - skundandi fram um øll hini, sum eru til gongu. Men løtu seinni standa somu fólk lið um lið og bíða, tí Knippelsbro í Keypmannahavn verður heysað upp, tí eitt skip skal undir hana. Í dag síggja vit tað sama, tá ið bilfarararnir dystast um at koma fyrstir fram til reyða ljósið at bíða!

Tá er gott, at onkur okkara hevur stundir. Hugsið tykkum, um ongin hevði stundir at skipa fyri ítróttinum, at skipa fyri felagslívi, samkomulívi, vinnulívi, álvara og gaman. Ja, hugsið tykkum, um ongin hevði stundir at gera marmennlar? Tá høvdu vit at sonnum verið fátøk.

Um eitt listafólk ikki gevur sær stundir, verður onki listarverk. At skapa tekur tíð - at liva tekur tíð. Lívið er eitt listarverk. Tess betri stundir tú gevur tær, tess størri virði liggur í lívinum. Listarfólk hava stundir. Og listin rakar okkum. Í ár er hon vorðin enn sjónligari í Fuglafirði. Vit kunnu velja at gleðast um listina, at argast av henni, at undrast av henni ella bara lata hana fáa frið. Øll hava tó eina meining um júst hesi listarverk, sum nú eru uppsett, tí tey eru so sjónlig.

Marmennlarnir renna har úti á arminum. Latið teir bara renna. Teir hava ferð yvir sær, men tað sær eisini út sum hava teir tíð at hava skund. Ein situr, ein rennur. Tann lítli er farin upp í loft. Teir eru rættuliga livandi. Kanska renna teir undan rokningini, kanska renna allir norður til Frits, kanska renna teir undan gjógvarámonnunum og norður til bakkagrellini. Latið teir bara renna - eg smíli.

Marmennlar eru ikki óndir sum trøll. Í søgnini eru teir stuttligir og vinna okkum smáar neisir - teir eru rættir knorlar, og søgnin um Anfinn bónda í Oyndarfirði, sum fekk ein marmennil á snørið, sigur okkum, at marmennlar eru á havsins botni. Teir arga okkum, krøkja agnið av, tá ið vit liggja á miði. Bóndin tók sín marmennil heim til húsanna og hevði hann hjá sær. Hvønn dag risti hann kross fyri honum, so hann ikki skuldi rýma. Vanliga slapp marmennilin við bóndanum á flot, og var fiskur undir bátinum, gjørdist marmennilin kátur og leikaði í. Ein dagin, teir fóru á flot, hevði bóndin av misgáum ikki rist krossmerkið fyri marmennlinum, og komnir út á mið leyp marmennlið aftur í dýpið, og har er hann enn saman við sínum líkum.

Mær tykir, at marmennlarnir duga væl at liva - teir hava stundir at vera til! Úr vindeyganum síggi eg nú ein marmennil hvønn morgun, tá ið eg fái mær morgunmat. Kanska eru marmennlarnir, fiskarnir, taraskógvurin og havvøksturin vakrir - kanska eru teir ikki vakrir. Kanska eru meira stuttligir enn vakrir - tað eru teir fyri mær. Teir eru undirhald. Ein heilur býur verður undirhildin av marmennlum, listarfólki og løgnum fiskum. Ongastaðni í heiminum eru so nógvir løgnir fiskar at finna! Vit **kunnu** gleðast um hetta - men vit ráða sjálvi!

Vit, sum liva og búgva her, vara nú av hesum listarverki og kunnu vóna, at tað stendur so leingi, her býr nakað fólk.

Okkara fólk dugir væl at liva - at hava stundir. Og best av øllum dámar mær at hava stundir at vera hjá børnunum, tá ið tey sovna. At syngja fyri teimum, at biðja við teimum - og av øllum sjangrum dámar mær best vøgguvísur - okkara Alexandur eigur eina, har tvey ørindi eru:

*Sov, mín søti skattur, lat eygu tíni aftur;*
*Ligg so stillur, sovna brátt,*
*Droyma skalt tú blítt í nátt.*
*Sov, mín søti skattur.*

*Sov, mín søti skattur, lat eygu tíni aftur.*
*Havið durvar spegilsskært,*
*Størnur glitra himnahjart.*
*Sov, mín søti skattur.*

Vit liva millum fjallana, og merkir hetta serliga listina til eygu og oyru. Málningarnir herfrá hava ofta fjøllini, líðirnar, brekkurnar og ljósið við. Ein,ið tók sær rúmar stundir at yrkja um heimbygdina var Ismar Joensen. Í "Heimbygd mín" yrkir hann um fjøllini, og ljóða tey seinastu fýra ørindini soleiðis:

*Tey fjøllini í ring so reyst,*
*Øll átta veita trygd,*
*At ódn, sum tók á havi leyst,*
*Ei sakar vára bygd.*

*Í suðri hevja Tyrlar seg,*
*Og Kambur er nær hjá,*
*Gjógvaráfjall í nónstaði,*
*Í vestri Blábjørg blá.*

*Teim næstur Slætnatindur sæst,*
*Og Húsafelli nær*
*At Borgini sær heldur fast.*
*Rytafjall ringin slær.*

*Kom, vitja hesi fjøll við mær*
*Í summarsól og dýrd,*
*So verður sálin lætt í tær,*
*So ljóðkát og væl hýrd!*

Eitt fólk,ið eigur list, djóralív, undirhús, søgur, tónleik, samhuga, hjartarúm og gudsótta er eitt ríkt fólk. Og tá er vert at leggja til merkis, at nógv vælferðarsamfeløg eiga onki av hesum. Vælferðin er materialistisk - listin, djóralívið, undirhúsið, søgurnar, tónleikurin, samhugin, hjartarúmið og gudsóttin hevur onki við materialismu at gera. Mong menningarlond eru nógv ríkari enn ídnaðarlondini - men kortini hava tey færri pengar. Ov nógvir pengar eru hjá mongum ein forðing fyri at liva eitt ríkt lív!

Nixon forseti segði, at mong menniskju halda, at lívsins meining er ríkidømi, njóting og frælsi at gera, sum tey sjálvi vilja. Alt hetta hevur týdning, so leingi vit ikki hava tað. Men tá ið vit hava fingið tað, so kenna vit, at tað ikki gav lívinum meining.

Ein áminning og eggjan, sum mær dámar best av øllum, finst millum halgu skriftir okkara - í Prædikaranum. Har vera vit mint á at liva og hugsa um skapara okkara longu nú, meðan okkum er unt at hugsa og virka. Hesin teksturin kókar av poesi - skaldskapur á hægsta stigi. Ein lærdómur um lívið.

Prædikarin lærir okkum, at lívsins meining er longu her, sum vit eru - um vit hava pengar ella ikki.

Nú fara vit at taka saman um hesa sveiman okkara um tað at liva og at hava stundir. Vit taka samanum við at lesa úr Prædikaranum, tá ið hann sigur:

"Og hugsa um skapara tín í ungdóms døgum tínum, áðrenn teir vondu dagarnir koma, og tey árini nærkast, sum tú sigur um: "Tey huga mær ikki;"

Áðrenn sólin myrknar, og ljósið og mánin og stjørnurnar (t.e. umdømi, tankar og minni), og áðrenn skýggini koma aftur eftir regnið (t.e. mótloysi);

Tann tíðin, tá ið teir, sum sita um húsið skelva (armarnir), og maktarmenninir verða kropnir (fingrarnir), og genturnar á kvørnini leggjast fyri (tenninar), av tí at tær eru vorðnar fáar, og dimmligt er vorðið hjá teimum, sum hyggja út gjøgnum glugg-arnar (eyguni);

Og báðar útdyrnar verða stongdar (oyruni), meðan dunið av kvørnini minkar (røddin); tá ið maður fer á føtur, tað fyrsta fuglur fer at láta, og allar songkonur verða lágmæltar (sangrøddin);

Tá ið maður stúrir fyri hvørjari brekku, og ræðslur eru úti á veginum, og mandlutræið stendur í blóma (gráa hárið), og grashoppurnar (kropni ryggurin) streva seg fram, og káperberið (matarlysturin) dovnar; tí at maðurin fer til sín æviga bústað, og tey, sum syrgja, ganga um gøtur;

Áðrenn silvurtráðurin slitnar, og gullskálin brotnar (mannalívið á fold), og krukkan fer sundur við kelduna (hjartað), og hjólið dettur brotið í brunnin (likamið verður jarðað),

Og moldin fer aftur til jørðina, har sum hon var áður, og andin fer aftur til Guðs, sum gav hann."

So nógv frá Prædikaranum. Eg taki uppaftur: Hugsa um skapara tín, áðrenn evnini at hugsa eru farin! Hesi orð áminna okkum at leggja merki til nútíðina hjá hvørum einstøkum. At vit skilja millum materialismu og ríkidømi, millum verandi og komandi bústað okkara.

Takk fyri tit lýddu á - takk fyri stevnuna, øll somul, og góðan sunnudag!

# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo, runa@sosialurin.fo, Fartelefon 222983

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Jóhan á Lava úr starvi

Fríggjadagin 23. juli fer Jóhan á Lava úr starvi sínum sum stýrimaður umborð á Dúgvuni. Hann byrjaði at arbeiða fyri Strandferðsluna í 1985. Tá sigldi hann fyrst við Ternuni I um Leirvíksfjørð. Síðani sigldi hann við Trónda um Skopunarfjørð í eitt stytri tíðarskeið.

Frá 1989 til 1996 var hann skipari á Rituni um Nólsoyarfjørð.

Jóhan fylti 67 ár 18. juli og fer sostatt frá fyri aldur. Tað verður helst nakað friðarligt umborð á Dúgvuni ta fyrstu tíðina, og saknur fer at verða í hansara skemtiligu og til tíðir stak beinraktu viðmerkingum.

- Ferðafólk, nú eru bert tveir ferðaseðlar eftir, so nú ræður um at skunda sær, er ein viðmerking, , sum Jóhan hevur rópt út um alt skipið, sum nógv hava flent at.

Blíður og altíð í góðum lag man vera sereyðkenni hjá Jóhan á Lava. Óansæð um tað er fyrst á morgni ella seint á kvøldi.

Jóhan er sum sagt stýrimaður umborð á Dúgvuni og av og á loysir hann av sum skipari.

Hann er sonur Elisabeth og Jákup á Lava. Elstur er hann av fimm beiggjum og uppvaksin í Havn.

Tó treivst hann altíð avbera væl hjá Issalinu Linklett á Stongunum í Klaksvík. Seinni giftist hann eisini til Klaksvíkar við Solveig og eiga tey tvær døtur. Abbabørnini eru trý í tali og eitt langabbabarn eigur Jóhan á Lava eisini.

MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barnium við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

## Dagurin

**23. juli. Appolinaris**. Sigst at hava verið ferðafelagi hjá ápostlinum Pæturi og varð av honum sendur til Ravenna í Italiu sum trúboðari. Har gjørdist hann fyrsti biskupurin, men varð fyribeindur umleið ár 75 av uppøstum heidningum.

22. ella 23. juli byrja **hundadagarnir**, og halda teir á til 23. august. Navnið hava teir eftir stjørnuni Sirius, Hundastjørnuni. Tá ið hon kemur upp á luftina um hetta mundið, stendur hon næst sólini. Fyrsti hundadagurin sigst at vera heitasti dagur á árinum, og um veðrið verður annars sagt, at sum tað er fyrsta dagin, verður tað allar hundadagarnar. Í 16. øld fingu dagarnir latínska navnið *Dies Caniculares* (hundahvølpadagarnir), men annars verður hildið, at navnið gongur aftur til gamla Egyptaland. Um tað mundi, tá ið Sirius, Hundastjørnan, kagaði inn í ein glugga í einari av pýramidunum, fór Niláin upp um áarbakkarnar. Tað var sum áður nevnt ein egyptiskur ráðgevi hjá Juliusi Caesar, Sosigenes, sum legði til rættis tann sonevnda julianska kalendaran. Haðani er so hundadaganavnið komið við í kristnar álmanakkar.

# Bjørn Lomborg á vitjan í Føroyum

TÍÐINDASKRIV
*frá Vinnumálaráðnum*

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í orkumálum, hevur bjóðað navnframa Bjørn Lomborg til Føroya í sambandi við, at arbeitt verður við at orða yvirskipaðan orkupolitikk fyri Føroyar. Fríggjadagin tann 20. august 2004 kl. 14 fer Bjørn Lomborg at halda fyrilestur í Norðurlandahúsinum um orku- og umhvørvisspurningar. Eitt panel við fýra føroyskum luttakarum umboðandi áhugamál innan umhvørvi, orku, samfelags- og búskaparfrøði fer at seta Bjørn Lomborg kvalifiseraðar spurningar eftir fyrilesturin, sum verður ókeypis og opin fyri almenninginum.

Bjørn Lomborg varð borin í heim í 1965. Hann er útbúgvin cand.scient.pol og phd, og arbeiddi frá 1994 sum adjunktur og seinni sum lektari við Árhus Universitet. Í 1997 setti hann ein lesiring at aft-urvísa uppáhaldið hjá einum amerikanskum búskaparfrøðingi, sum meinti, at støðan hjá jørðini var batna og betur, enn fólk hildu. Úrslitið av arbeiðinum var ikki tað, sum Lomborg hevði væntað, við tað at flestu uppáhaldini vístu seg at vera røtt.

Bjørn Lomborg bleiv kendur í Danmark í byrjanini av 1998, tá hann í dagblaðnum Politikken skrivaði fýra langar greinar um standin hjá umhvørvinum á jørðini. Í hesum greinum royndi Lomborg at afturvísa nøkur av uppáhald-unum ella mytunum um vánaligu støðuna hjá umhvørvinum. Nógv vreiði stóðst av hesum, og vóru o.u. 400 greinar skrivaðar sum aftursvar uppá meiningarnar hjá Lomborg.

Grundað á greinarað sína útgav Lomborg í 1998 bókina "Verdens sande tilstand", sum í 2001 varð útgivin á enskum við heitinum "The Skeptical Environmentalist" í eini munandi víðkaðari og dagførdari útgávu. Bókin er umsett til svenskt, íslendskt, týskt, spanskt, franskt, portugisiskt, italienskt, kore-anskt og japanskt.

Í útlondum er Lomborg vorðin víðagitin. Í 2001 varð hann valdur sum "Global leader of tomorrow" av World Economic Forum. Í 2002 varð hann nevndur ein av "50 stars of Europe" í Business Week. Fyri kortum var Lomborg - sum einasti danin - við í yvirlit-inum hjá Time Magazine yvir 100 teir týdningarmiklastu persónarnar í heiminum undir bólkinum "Scientists & Thinkers".

Tá Institut for Miljøvurdering bleiv stovnað í februar 2002, varð Lomborg settur sum stjóri á instituttinum - við farloyvi frá Árhus Universitet. Fyri einum mánaða síðani boðaði Lomborg frá, at tá farloyvi hansara er úti 1. august í ár, fer hann aftur til gamla starv sítt sum lektari í samfelagsfrøði við Árhus Universitet.

Eitt av avrikunum hjá Lomborg sum stjóri fyri Institutt for Miljøvurdering var at skipa fyri Copenhagen Consensus, ein ráðstevna, har 8 av teimum leiðandi búskaparfrøðingunum í heiminum vóru savnaðir fyri at meta um, hvussu vesturheimurin átti at raðfest verandi figgjarorku í sambandi við royndirnar at betra um trupulleikarnar/neyðina í heiminum. Lomborg fer framhaldandi at verða knýttur at instituttinum sum ráðgevi við tí fyri eyga at luttaka í uppfylgjanini av Copenhagen Consensus, umframt at fyrireika eina møguliga nýggja ráðstevnu í 2008.

Fleiri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Bjarna Djurholm, landsstýrismann, á tlf. 356060 ella 315940.

pm

**Móttøka – 60 ára føðingardagur**

Í sambandi við, at Poul Michelsen tann 22. juli verður 60 ár, bjóða vit samstarvsfelagum, vinum og kenningum til móttøku í virkisbygningi okkara á Hoyvíksvegi 74, Tórshavn.

Móttøkan verður **fríggjadagin 23. juli** millum **kl. 16 og 19**.

**P/f Poul Michelsen**

## Tøkk

Øllum tykkum, sum mintust meg á mínum 60 ára føðingardegi tann 4. juli og við gávum, blómum, fjarritum, telefonsamrøðum og á annan hátt gjørdu mær og familjuni dagin hugnaligan, takki eg hjartaliga.

Vinarlig heilsan
**Óli Hammer**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara kæri pápi, verpápi, abbi og langabbi

**Valdemar Djurhuus**
fyrrverandi sýslumaður í Eysturoy,
ættaður úr Sumba

andaðist á Landssjúkrahúsinum 21. juli, 86 ára gamal.

Farið verður úr landssjúkrahúskapellinum fríggjdagin kl. 18.00.
Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni leygardagin 24. juli kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*
**Esther, Jóhan, Karl og Dagny**